## Andlát og jarðarferðir

Urnan við **Ian Onghamar** fer úr kirkjugarðskapellinum leygardagin 7. februar klokkan 13.

**Alma Bernhardson í Miðvági** andaðist á Landssjúkrahúsinum 4. februar, 54 ára gomul. Bønarhald verður á kapellinum fríggjdagin kl. 14. Jarðarferðin verður úr Miðvágs kirkju sunnudagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Almu kunnu lata eina gávu á konto í Eik 9181, 170.81.14

Kistan við **Jústu Vang** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi fríggjakvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Hvalbiar kirkju leygardagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Jústu, kunnu lata eina peningagávu til áhugabólkin hjá blóðdialysu. Konta í Eik.

## Takk

Hjartaliga takki eg øllum, sum mintust meg við gávum og telegrammum á mínum 75 ára degi tann 6. des. 2008.

**Heilsan**
**Jóhanna Danielsen, Hósvík**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður, pápi og abbi okkara

**Finnur Mikkjalsson Helmsdal**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum mongu, sum á ymsan hátt stuðlaðu okkum, meðan Finnur var sjúkur.
Tøkk til familju og vinir, og tøkk til starvsfelagar á Barnaheiminum og í Tinginum fyri umsorgan og hjálpsemi.
Tøkk til øll tykkum á Landssjúkrahúsinum, sum gjørdu tykkara til, at seinasta tíðin hjá Finni gjørdist virðilig og vónrík.

Tøkk til Hoyvíkar kirkju, kirkjuráð, kirkjutænarar, sangarar og berarar fyri eina heiðurliga jarðarferð.
Tøkk til Ólav Rasmussen, Hera Joensen og Árna fyri troystarrík orð í kirkjuni og kapellinum, og tøkk til vinir og starvsfelagar fyri vakran sang í kirkjuni.

Øllum tykkum mongu, sum komu at fylgja og á ymsan hátt hjálptu til og stuðlaðu við jarðarferðini og ervinum, takka vit hjartaliga.
Tøkk til HB-arar, skúlafelagar úr Hoyvíkar Skúla og foreldur, tøkk til góðar vinir og starvsfelagar á B8 og G1.

Stóra tøkk fyri heilsanir, blómur og gávur.

*Familjunnar vegna*
**Jórun**

# Umsorganarheimið í Grønulíð



*Starvsfólkini á Umsorganarheiminum í Grønulíð, f.v.: Sunnleif Jacobsen, Yvonna Drangberg, Emil Thorleifsson, Karl Rasmussen og Poul Poulsen*

Í sambandi við at umsorganarheimið hjá Bláa Krossi er latið upp í Grønulíð í Havn, var móttøka á heiminum mikudagin 4. februar.

Mótøkan byrjaði klokkan 16, og eftir at aðalskrivarin hjá Bláa Krossi, Hjalmar Hansen, hevði boðið øllum at vera vælkomin, greiddi leiðarin fyri heimið, Yvonna Drangberg, frá um heimið og hvussu ein gerandisdagurin gongur fyri seg.

Umsorganarheimið er eitt heim fyri heimleys og fyrsta av sínum slagi í Føroyum. Í fleiri ár hevur Blái Krossur í Føroyum arbeitt við at finna onkra loysn fyri tey í Føroyum, sum ikki hava ein fastan bústað. Heimið er ætlað teimum, sum av onkrari orsøk ikki sjálvi megna at útvega sær og fasthalda ein bústað.

Umsorganarheimið lat upp mánadagin tann 15. desember 2008, og fluttu fyrstu búfólkini inn hendan dagin. Búpláss er til 7 fólk, sum ikki hava nakran bústað. Húsini eru sett í stand, og eru nú ein virðiligur karmur um eitt heim, sum verður ein varandi bústaður hjá teimum, sum koma at búgva har. Umsorganarheimið er ikki skipað á sama hátt sum t.d. Herbergið hjá Frelsunarherinum.

Umframt leiðaran eru fýra onnur fólk sett í starv á heiminum, tey eru: Emil Thorleifsson, Sunnleif Jacobsen, Poul Poulsen og Karl Rasmussen.

*mg*



*Rósa Samuelsen landsstýriskvinna var við til móttøkuna*



*Umsorganarheimið í Grønulíð*

Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli:

# Spírandi list - onnur framsýning

Framsýningin "Spírandi list" hjá Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla í Smiðjuni í Lítlvík, sum byrjaði hósdagin 29. januar, heldur áfram við øðrum næmingum.

Hósdagin 5. februar kl. 14 læt ein onnur framsýning upp. Hesaferð er talan um framsýnarar, sum eru royndir og kendir næmingar hjá Randi M. Gunnarsdóttir á skúlanum. Næmingarnir ganga á framhaldsskeiðnum á kvøldskúlanum. Millum 70 og 80 málningar eru á framsýningini.

Tey, sum sýna fram eru: Vera Bjørgvin, Maria Sørensen, Anna Hansdóttir, Martina Eriksen, Ólavur Tomsen, Hergerð Joensen, Lív Reynheim, Beinta Gaard, Louisa Fjallsbak, Anna Maria Nyby og Katrin Vardum.

Opið eru allar dagar frá kl. 14 -18, tó leygardagin frá kl.10 -18 og sunnudagin frá kl.15 -18.

Framsýningin er opin til og við týsdagin 10. februar.



**Dagurin**
**6. februar. Duruta**, deyð umleið ár 300. Henda unga gentan í Kesarea í Kappadokiu vildi heldur ikki vita av einum heidnum fríggjara, sjálvum landshøvdinginum, og hann læt hana hálshøgga. Navnið Dorothea er grikst og merkir Guðs gáva.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*